

# Vónin um framtíðar eldrarøkt

**Jane Verity heldur skeið um »The Eden Alternative« á Hotel Hafnia 8.-11. mai 2006**

Hugsa tær okkara eldrastovnar sum heim, har vit øll somul droyma um at sleppa at liva okkara seinastu ár. Heim, sum eru full av lívi, gleði, anda og samanhaldi. Hugsa tær, at tú gleðir teg til at taka ímóti røkt 24 tímar um samdøgrið. Og so kostar tað ikki meira enn dagsins eldrarøkt.

Tað ljóðar sum ein ynskidreymur, men so er ikki longur. Konseptið »The Eden Alternative« er longu til og virkar væl fleiri staðni í heiminum.

Dr. Bill Thomas er upphavsmaður til verkætlanina. Hann hevur arbeitt á røktarheimi, og har eygleiddi, sá og upplivdi hann, hvussu tað kendist. Niðurstøðan var, at búfólkini hava tríggjar umsorganar-plágur: Einsemi, keðsemi og hjálparloysi. Ein betri loysn mátti finnast, helt hann, og burtur úr hesum spurdist »The Eden Alternative«.

Sama um tú býrt, arbeiðir ella vitjar á røktarheimi, so gevur »The Eden Alternative« eina uppskrift uppá, hvussu tú skapar eitt lítið samfelag, har øll kunnu gerast virknir luttakarar og áhaldandi grógva sum menniskju.

Viðurkendi ergo- og familju-terapeuturin Jane Verity hevur skeiðið í Føroyum. Hon er høgt í metum, og hennara fyrilestrar eru merktir av einum brennandi áhuga fyri eldri fólkum. Tað merktu teir føroyingar eisini, sum luttóku á hennara skeiði um demens í fjør. Jane Verity hevur fingið undirvísing frá Dr. Bill Thomas, ið viðmælir hennara skeiði um »The Eden Alternative«.

**Skráin 8., 9. og 10. mai kl. 9-16**

**1. dagur**
Vælkomin. Innføring til »The Eden Alternative« og tær 10 grund-reglurnar. Neyv gjøgnumgongd av tveimum teimum fyrstu grundreglunum

**2. dagur**
Neyv gjøgnumgongd av fýra teimum næstu grundreglunum í »The Eden Alternative«.

**3. dagur**
Neyv gjøgnumgongd av fýra teimum síðstu grundeglununum í »The Eden Alternative«.

**Kostnaður**
Skeiðkostnaðurin er 3.900 krónur við morgunmati, døgurða og kaffi.

**Skráin 11. mai kl. 9-15**
»The Eden Alternative« er eisini evnið á einum 1 daga innførsluskeiði, sum Jane Verity skipar fyri á føroyaferðini. Farið verður gjøgnum tey 10 punktini, sum konseptið byggir á.

Kostnaður: 1000 kr. íroknað morgunmat, døgurða og kaffi.

Skeiðini eru ætlað røktarstarvs-fólkum og annars øllum, sum varða av eldraøkinum. Avmarkað luttøka er til bæði skeiðini.

**Tilmelding**
Skriva til Margaret Johannesen, t-post: flesin@post.olivant.fo. Eru spurningar, kanst tú ringja á telefon 210802.

Seinasta freist at melda til er 21. apríl kl. 12.

Alzheimerfelagið
Fyrireikingarbólkurin Eden
www.alzheimer.fo


## Vinn eina súkklu!




Á gøtuni er ein brævkassi, legg navn og bústað tín í kassan, og tú ert við í lutakastinum um eina súkklu.

Stig
www.stig.fo



## Til sølu



**OPEL ASTRA 1.6 16V**

**Bilurin er frá 1999 og sær rættuliga gott út 4 nýggj dekk á alufelgum fylgja við**

**Til sølu fyri 70.000 kr.**

**nærri fæst at vita við at venda sær til:**

**Sp/f Plátuverkstaðið**
v/Glenn Perdomo
tel 321778 ella 221778



**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

**22 50 00**



VIVA

Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ






- **100% Viðlíkahaldsfrítt**
- **Longri livitíð**
- **Meira startorka**

VARTA PRO motive

POLAR
Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd

**Sigmundargøta 26 - Tórshavn - tlf. 318347**